**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Hans Pauli Joensen (HPJ), Janus Jensen og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 10. februar 2015 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til støðutakan:**

- Mannagongd fyri merkisdagar
- Mannagongd fyri heilsuhjálp til starvsfólk

**Mál til umrøðu:**

1. **Mannagongd fyri merkisdagar**
   JM legði fram uppskot um mannagongd fyri merkisdagar.

   Endamálið við mannagongdini er, at starvsfólk og leiðsla vita, hvørjir merkisdagar verða hátíðarhildnir á Fróðskaparsetri Føroya, soleiðis at øll fáa somu viðferð eftir góðkendum innanhýsis reglum.

   Avgerð tikin um, at JM dagførir tekstin og sendir mannagongdina út aftur til viðmerkingar.

2. **Mannagongd fyri fyribyrgjandi heilsuhjálp**
   Hugin/JM hava orðað eitt uppskot til mannagongd "heilsuhjálp til starvsfólk", hvørs endamál er at tryggja góðar arbeiðsumstøður og trivnað millum starvsfólkini á Setrinum.

   Mannagongdin varð góðkend og er send til rættlestur.

3. **50 ára búmerki**
   Uni Árting hevur gjørt eitt 50 ára búmerki í sambandi við at Setrið fyllir 50 ár tann 20 mai 2015.

   Ætlanin er at øll starvsfólk á Setrinum skulu nýta búmerkið undir signaturinum tað sum eftir er av árinum. JM sendir øllum starvsfólkunum á Setrinum búmerkið, saman við einari vegleiðing í hvussu búmerkið skal setast upp.

4. **Matstovan á NÁD**

Bowlinghøllin hevur víst áhuga fyri at reka matstovuna, men tað er treytað av, at Setrið veitur stuðul til virksemið.
JM kannar um aðrir veitarar eru áhugaðir í at reka matstovuna.

/JM